gult cyan magenta svart



SKEIÐSDEPILIN Á LANGASANDI
The Course Centre at Langasandur

## Skeiðsrøðir

Í tíðarskeiðnum september 2000 til mars/apríl 2001 verða hesar skeiðsrøðir hildnar. Avmarkað luttakaratal: 8-10 eftir tilmeldingardegi. VSR eru 6 vikuskiftisskeið frá fríggjakvøldi til sunnudags; MVR eru 6-8 miðvikuskeið frá týskvøldi til hósdags.

**VSR-1: Enskt byrjanarstig –** 6 vikuskifti
**VSR-2: Enskt lágstig (KET)** – 6 vikuskifti
**VSR-3: Enskt framhaldsskeið (PET)** – 6 vikuskifti
**VSR-4: Føroyskt fyri øll** – 6 vikuskifti
**VSR-5: Faroese for non-Nordic Speakers** – 6 vikuskifti
**MVR-1: Enskt hástig (FCE)** – 6 miðvikur
**MVR-2: Enskt í Altjóða Samskifti, Handli og Umsiting** – yrkisskeið (CEIBT), 8 miðvikur
**MVR-3: Altjóðaligt læraraskeið í enskum** – yrkisskeið (CEELT), 6 miðvikur
**MVR-4: Enskt í Ferðavinnuni (CTE)** – yrkisskeið, 6 miðvikur.

Skeiðsmappa við øllum upplýsingum um Skeiðsdepilin, skeiðini, kostnaðir, tilmeldingarblað o.a. fæst við at skriva til Depilin ella ringja til avgreiðsluna, tlf. 422574.

**SKEIÐSDEPILIN**
438 Langasandur
Tlf. 422574 • Fax 422521

## Summarfrí

Stongt verður frá 24. juli til 14. august.

Matrikulstovan

SOLAR FØROYAR

## Starvsfólk søkist at byrja skótast

**Arbeiðsuppgávur:**
Talan er um fjølbroytt arbeiði í umfatar sølu av alarmútgerð, edv, tele og alt tað ein el-innleggjari hevur brúk fyri.

**Førleikakrøv:**
Tann sum settur verður skal helst hava útbúgving sum elektrikari. Kunnleiki innan handil hevur eisini fyrimun.

Fyrispurningar og umsókn verður at senda til:

**Solar Føroyar
Postboks 105
Brekkutún 2
110 Tórshavn
Tlf. 317933**

Sosialurin - 311820

## Føroya Barnaheim

Søkt verður eftir **tveimum** pedagogum til Føroya Barnaheim, 40 tímar um vikuna. Talan er um eitt fast starv frá 15. august 2000 ella eftir nærri avtalu og eitt farloyvisstarv frá 15. oktober 2000 til 14. oktober 2001.

Føroya Barnaheim er ein samdøgursstovnur fyri børn og ung í aldrinum 0–18 (20) ár, ið kunnu búgva her í styttri ella longri tíð. Á Barnaheiminum er pláss fyri 15 børnum og ungum, umframt 5 bráðfeingis pláss, á tveimum deildum; eisini kunnu familjur koma til eygleiðing og síðani til vegleiðing.

Uppgávurnar hjá pedagoginum eru fjølbroyttar og verða settar út frá tørvinum hjá tí einstaka barninum og familjunum.

Barnaheimið bjóðar viðkomandi eitt áhugavert starv við víttfevnandi uppgávum og møguleikum fyri at luttaka á fakligum skeiðum.

Skrivlig umsókn av avriti av prógvum og ummælum skal sendast til Føroya Barnaheim, att. Stýrið, Fríða Patursson, Pedda við Steinsgøtu 10, 100 Tórshavn innan 31. juli 2000. Løn sambært avtalu millum Føroya Landsstýri og Føroya Pedagogfelag.

Meira fæst at vita við at venda sær til Sólrun Jacobæus, leiðara, ella Karlu Danielsen, varaleiðara, á telefon 31 23 20.

## Lær zoneterapi!

**Et vidunderlig yrke.
Nytt kurs tilbys fra høsten.**

Utdannelsen består av:
200 timers undervisning i praktisk fotzoneterapi, anatomi/fysiologi, alternativ sykdomslære, øreakupunktur samt ernæringslære.
Eksamen i juni 2001.

Kurset avvikles med en intensivweekend pr. mnd. og er meget intensivt opplagt og fører fram til soneterapi på profesjonellt nivå og er godkjent av Samband for Alternative Behandlere i Danmark og Norsk Forening for Soneterapeuter m.m.

Undervisningen følger den kjente danske zoneterapeut Lilian Holst's (skolens leder) anerkjente undervisningsopplegg og gis av lærer med over 30 års undervisningserfaring og mange års stor erfaring fra egen klinikk. Undervisningen og lærebøker er på meget lettfattelig skandinavisk.

Ring eller skriv etter kursprogram.

**Vestegnens Zoneterapeutskole, Danmark**
Repr. for Færøyene:
Føroya Natúrmedisinska Klinikk
Sundsvegur 10, FO-100 Tórshavn
Telefon: (298) 32 03 95
kl. 09–11 og kl. 19–21 mand.–fred.
Fax hele døgnet: (298) 32 03 96

## H71

Aðalfundur felagsins verður í Hoyvíkar skúla tann 20.07.00 kl. 20.00.

1. Val av nevnd
2. Góðkenning av roknskapi
3. Viðtøkubroytingar
4. Ymiskt.

## Stuðulspedagogar/hjálpara

Søkt verður eftir tveimum stuðulspedagogum/hjálparum at byrja í Dr. Margrethu barnagarði, Klaksvík, 1. september 2000, 30 tímar um vikuna.

Annað arbeiði er á barnagarðsstovu og hitt á vøggustovu.

Ynskiligt er, at tann, ið settur verður, hevur hóskandi fakliga útbúgving ella royndir.

Setan sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálastýrið.

Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til leiðaran á Stuðulsstovuni tlf. 443270

Umsóknir saman við avritum av prógvi verða at senda til:

**Barnaverndarnevndina
Klaksvíkar Kommuna
Postsmoga 2
700 Klaksvík**

í seinasta lagi tann 12. august 2000

Klaksvíkar kommuna

GÓÐKENDUR
ROTTANGI
úr glasfipuri



FØROYSK FRAMLEIÐSLA
Prísur 6.500,-

ALUMINIUM & PLASTVIRKIÐ P/F
www.plastvirki.fo

**Umsiting:**
Tel 31 87 96
Fax 31 87 46
Í Svanga 23
Postboks 199
FO-110 Tórshavn
e-mail: plastvirki@plastvirki.fo

**Verkstaður:**
Norðagøta

team 85 • 31 65 11

gult cyan magenta svart





*Tey á myndini eru frá vinstru:
Sólvá Ebersten (Michelsen), Katrin Samuelsen (Hansen), Margit Hansen, aftanfyri Andreas Reinert, Jonna Jørgensen (Knudsen), Kári Petersen, Gulli Skovsgaard (Johansson), Tórdis Nielsen (Mohr), aftanfyri Jákup Lindenskov, Elsbeth Olsen (Sloan), Malena Djurhuus (Clementsen), Birna Rayer (Helmsdal).*
*Tær báðar Hansina Hentze (Jacobsen) og Margretha Balle (Mohr) vóru tarnaðar ta løtuna, myndin varð tikin*

# Hittust aftur 50 ár eftir realskúlan

Jákup Lindenskov

Fríggjadagin 23. juni stevndu realskúlanæmingarnir, sum fóru í realskúlan í Havn í 1945 og vóru liðug í 1950, saman fyri at halda hetta 50 ára minni.

Tey hittust seinrapartin í teim gomlu skúlahølunum, har skúlastjórin, Hanus Joensen, beyð teimum at verða vælkomnum um ta slitnu stovugáttina og frøddist um tað, at so fornir næmingar mintust skúlan – í hvussu er við sorgblídni. Hann nevndi, at hann fyri kortum hevði havt fleiri av teimum gomlu vitnisburðarbókunum hjá næmingum á hondum – heilt aftur til 1916, men skuldi ikki koma meira inn á hetta.

Aftan á at næmingarnir høvdu prátað saman, havt lítla minningarløtu um teir 11 dreingirnar, sum farnir eru av verðini, vísti Hanus loftið á skúlanum, sum hesir fornu næmingarnir ongantíð høvdu sæð.

Loftið er vítt og í dag verður tað brúkt til teldu-undirvísing, køksundirvísing og undirvísing í seyming. Tað er at siga, at sungnir vórðu nakrir sálmar í somu stovu, har vanligt var at hava morgunsang fyri 50 árum síðani.

M. a. var sálmurin »I østen stiger solen op« og »Alt står i Guds faders hånd« sungnir av hjartans lyst. Tá var danska sálmabókin brúkt.

### Hildu veitslu í Mettustovu

Aftaná fóru øll oman í Tilhaldið í Tórsgøtu, har Vanja Petersen, fyristøðukvinnan tók ímóti hesum nýklæktu pensjónistum, vísti teimum húsini og greiddi frá Tilhaldinum.

Síðani fingu tey ein kaffisopa og køku afturvið, og har var rættuliga hugalit at síggja prátið millum tað fólk, ið har var komið.

Nakað av myndum var sett upp í hesum sambandi, sum annars verður at síggja, tá myndir verða sýndar av skúlanæmingum í Havn á ólavsøku.

Leiðin gekk síðan oman á Reyn og vitjað var í Nýggjustovu í gomlu Klokkaragøtu. Henda vitjanin var sera forvitnislig, tí hetta vóru húsini, har nógv umrødda Beinta ella Barbara hevði til húsa - og umframt onnur navnfrom fólk var hetta eisini heimið hjá V. U. Hammershaimb, grundleggjaranum av mállæru, her búði hann tey nógvu barndóms og ungdómsárini.

Um kvøldið var veitsla hildin í Mettustovu. Kokkurin Leif Sørensen hevði reikað fyri góða verðanum og bæði prát, sangur og røður annars vórðu havdar frammi undir sera góðum umstøðum. Hýrurin var av tí allarbesta, og kvøldið endaði heima hjá Malenu og Hjarnari Djurhuus til út á náttina.

Av teimum, vit síggja á myndirni, eru tær fimm búgvandi uttanlands, í Norreg, í Danmark og í Onglandi, og serliga var tað dámur yvir hesa samveru við teirra luttøku. Onkrir sangir vórðu gjørdir til dagin, og ein teirra hevði Jukim, Maður Elsbeth (Sloan) yrkt. Tey á myndini frá vinstru:

Prátið hetta kvøldið kom eisini inn á brandin í Tinganesi í 1950. Hetta kvødlið, 23. mai, vóru vit boðin heim til klassalæraran, Martin Holm, sum búði á Heygnum Mikla. Veðrið var av tí fagrasta, og gingið varð fót fyri fót til hús. Fyrst niðan eftir Sanatoriivegnum, Oyggjarvegnum og oman eftir Varðagøtu. Tá vit koma oman móti húsunum hjá Williami Heinesen, sóu vit roykin og eldlogan - og so til beins.

Tá vit komu oman á Vaglið, kemur ein Vauxhall koyrandi við ferð niðaneftir - og við floytuni í botn. Vit sóu, hvør bilstjórin var…

So út í Tinganes, har øll náttin gekk. Stórur var eldurin, og roynt varð at bjarga búnyttum úr uttaru húsunum.

Hetta var dagur, ið seint fer úr minninum, so dapur hann var - og ikki minni, tá eldurin 1. juni legði Hotel Føroyar í øsku og ein ung genta lat lív.

Teir 11, ið farnir eru, síðani hesir realskúlanæmingar fingu prógv í 1950, eru hesir:
Harri Lava, f. 2/10 1933, d. 6/3 1971, jarðaður í Havn
Anders Hansen, f. 29/4 1933, d. 23/12 1974, jarðaður í Havn
Bjørn Isholm, f. 26/12 1933, d. 5/11 1977 í Lousanne og jarðaður har
Kjartan Justinussen, f. 16/1 1933, d. 4/10 1982 jarðaður í Havn
Árni Isholm, f. 13/12 1933, d. 4/7 1984, jarðaður í Havn
Símun Simonsen, f. 12/10 1932, d. 18/11 1989, jarðaður á Glyvrum
Fróði Mouritsen, f. 1/6 1934, d. 7/1 1993, jarðaður í Havn
Jóannes Andreasen, f. 7/9 1933, d. 17/1 1994, jarðaður í Havn
Andreas Johansen, f. 25/2 1934, d. 20/6 1996, jarðaður í Havn
Poul Sloan, f. 6/1 1934, d. 26/12 1999, jarðaður í Havn
Herluf Joensen, f. 21/6 1934, d. 26/12 1999, jarðaður í Oslo



*Realfløkkurin frá 1950 helt borðhaldið í Mettustovu: Margretha Balle, Hansina Hentze og Margit Hansen*



**Fyrsti millumflokkur í Havn, august 1945:**
Standandi frá vinstru:Gentan við pappírinum er Annelise Kaaber og gentan við einari hond á øksluni er Birna Helmsdal,andlitið omanfyri er Hervør Joensen,síðan Símun Simonsen á Høgabóli,Bjørn Isholm og omanfyri hann Kjartan Justinussen. Sitandi frá vinstru:Anders Hansen -við hondunum fyri andlitið,Poul Sloan,Herluf Joensen,Fróði Mouritsen, Harry Lava og Lítli (Andreas Johansen).
Av dreingjunum á myndini er bert Andreas Reinert á lívi.
Annars er at siga,at flestu dreingirnir eru í gummiskóm.Yvaleyst úr rekagummi -kanska gjørdir í Hesti? Hetta er jú beint eftir krígglið og undir krígnum,og beint aftaná var annað tilfar ikki at fáa,brúkti tú ikki húðaskógvar.
Fróði er eisini í rotuskóm,hvítir tveingir er mannfólkalitur.Plousfour var eisini tá buksumóti.